*Lærarafelagið svarar atfinningingunum frá løgmanni:*

# Vit mugu bróta lógina -ella arbeiða í frítíðini

*– Tað verður týðiligari og týðiligari, at hvørki løgmaður, ella aðrir politikarar, skilja, hvat verkfallið snýr seg um. Men tað kann bara vera, tí teir ikki vilja skilja tað, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Lærarafelagnum*

- Eg kann á ongan hátt góðtaka, at eitt fakfelag ger spurninginum at játta pengar til eina lóg til ein part av lønarsamráðingunum. Tá tekur Lærarafelagið í veruleikanum Føroya Løgting av ræði sum játtandi myndugleika.

*Anfinn Kallsberg, løgmaður, í Sosialinum í gjár*

At Lærarafelagið átekur sær ein leiklut, har tað skal trýsta eina eykajáttan ígjøgnum í tingið, er einki minni enn fullkomin ørskapur. Hetta er tað sama sum, at læknar og sjúkraystrar í samráðingum um teirra lønir siga, at sjúkrahúsini skulu hava so og so stórar játtanir.

*Anfinn Kallsberg, løgmaður, í Sosialinum í gjár*

- Málið er ógvuliga prinsipielt. Vit eru við at upployse samfelagið við slíkum krøvum, og tí mæla eg fólkunum til at fara aftur til samráðingarborðið.

*Anfinn Kallsberg, løgmaður, í Sosialinum í gjár*

Tí vil eg mæla Lærarafelagnum til at taka við teimum 6,5% sum lønarhækkingin liggur á og fara aftur til arbeiðis. Eftir tað kann man so taka ein dialog við Undirvísingar- og Mentamálastýrið um á hvønn hátt og í hvørjum tempo man setir í verk teir ymsu tættirnar í fólkaskúlalógini......talan er um eina rammulóg, sum kann setast í gildi við tí ferð, sum man nú einaferð hevur fíggjarliga orku og menniskjaligar ressursir til.

*Anfinn Kallsberg, løgmaður, í Sosialinum í gjár*

**Læraraverkfallið**

ÁKI BERTHOLDSEN

Formaðurin í Føroya Lærarafelag hevur ikki góðar vónir til, at verkfallið fer at enda við bræði.

–Tað verður týðiligari og týðiligari, at politikarar heilt einfalt ikki vita, hvat verkfallið yvirhøvur snýr seg um, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hon sigur, at hetta er avdúkað fleiri ferðir, síðani verkfallið byrjaði.

Men seinast avdúkaði sjálvur løgmaður hetta so dyggiliga í Sosialinum í gjár, tá ið hann samantvinnaði tvey mál saman, sum yvirhøvur onki hava við hvørt annað at gera.

*Hvussu ber tað so til, at tit ikki enn hava fingið politikararnar at skilja, hvat málið snýr seg um?*



*– Vit ætla ikki at trýsta politikarar til at seta nakra fólkaskúlalóg í verk. Men tað, sum longu er sett í verk, hevur stóra ávirkan okkara starvsviðurskifti og tað er sólaklárt ein sáttmálaspurningur, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag*

– Tað kann bara vera tí, at teir ikki vilja skilja, hvat verkfallið snýr seg um. Vanlig fólk á gøtuni skilja málið so at politikararnir, sum eru ábyrgdarhavarar, ikki gera tað, kann bara verða av illvilja, sigur formaðurin í Føroya Lærarafelag.

**Bróta lógina - ella arbeiða í frítíðini**

Elsa Birgitta Petersen sigur, at Lærarafelagið ætlar sær als ikki at blanda seg uppí, nær teir ymsu tættirnir í fólkaskúlalógini verða settir í verk.

– Tað er ikki tað, sum verkfallið snýr seg um.

– Verkfallið snýr seg um, at vit vilja hava stundir til at útinna tann partin av lógini, sum longu er settur í verk. Her er talan um so umfatandi eyka arbeiði, at tað ber ikki til at gera í arbeiðstíðini, sum støðan er.

– Tí eru vit í teirri støðu, at antin mugu vit ignorera lógina og gerast lógbrótarar, ella mugu vit arbeiða í frítíðini.

– Og at arbeiðsgevarin ger krav uppá frítíðina hjá fólki er, einki minni enn ognartøka, sigur Lærarafelagsformaðurin.

– Tað er hetta, sum verkfallið snýr seg um og ikki um nakað annað. Og at hetta er ein púra greiður sáttmálaspurningur, er onki at ivast í, tí Lærarafelagið hevur rætt til at samráðast um løn og starvsviðurskifti hjá limunum, tað liggur fast.

**68 fólk - bara í Havn**

Men Elsa birgitta Petersen ivast eisini í, um politikararnir yvirhøvur vita, hvat teir hava gjørt.

Hon spyr t.d. um teir vita, at samstundis sum kommunuval verður í heyst skulu eisini skúlastýri veljast fyri hvønn skúla.

– Í skúlastýrunum skulu vera umboð fyri foreldur og skúlan.

– Bara í Havnini skulu 68 fólk veljast í hesi skúlastýri, sum fara at virka frá 1. januar.

–Tað er ein stórur spurningur um politikararnir yvirhøvur vita av hesum, ella um teir hava gjørt sær tankar um, hvussu hesi stýrini skulu samsýnast, ella um, hvussu viðurskiftini hjá ráðunum annars skulu vera, heldur formaðurin í Føroya Lærarafelag.

Annars fer Lærarafelagið at svara atfinninguum frá løgmanni alment aftur.

# Skúlabørn senda Elsu Birgittu, Karsten og Høgna postkort: Vit vilja sleppa aftur í skúla

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er verkfallið onki stuttligt meir - heldur ikki hjá børnunum.

Læraraverkfallið hevur nú vart í meiri enn ein mánað og enn røkist onki fyri, at tað fær ein enda.

Men nú fara avleiðingarnar av verkfallinum av álvara at merkjast og nú er vandi fyri próvtøkunum í framhaldsdeildunum, eins og undirvísingin hjá teimum smærru børnunum hevur verið fyri einum stórum bakkasti

Fólk, sum vara av skúlanum, eru eisini farin at gera meiri og vart við seg fyri at fáa gongd aftur á samráðingarnar, hvør á sínum øki.

Blokadur hava verið og fleiri eru í væntu. Skúlanevndir, lærarar, fakfeløg og foreldur hava gjørt vart við seg og sent mótmæli og áheitanir, og í dag verða undirskriftir savnaðir saman á skúlunum, sum síðani skulu handast myndugleikunum.

**Børn skriva postkort**

Og hjá summum er hugflogið gott. Tað nýggjasta tiltakið er, at í summum bygdum í Eysturoynni hava børn og foreldur tikið stig til at fáa øll skúlabørn í Føroyum at skriva politikarunum og lærarafelagnum postkort við ynskjum um at sleppa aftur í skúla.

Síðani hugskotið varð fostrað í Eysturoynni, er tað farið víða um landið so tey, sum hava ábyrgdina av støðuna, kunnu vænta sær nógvan post teir komandi dagarnar.

Í Eysturoynni hava tey skipað tað so, at tey hava savnað børnini saman hjá ávísum foreldrum, har tey so hjálpa teimum at skriva og at senda postkortini.

Og tað frættist, at foreldur fleiri aðrastaðni í landinum eisini hava tikið henda táttin upp.

Ætlanin er, sum sagt, at senda teimum postkort, sum hava ábyrgdina av verkfallinum. Og tey eru Elsa Birgitta Petersen, formaður í Lærarafelagnum, Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í undirvísingar og mentamálum. Foreldrini hava eisini gjørt eitt uppskot til tekstin, sum skal skrivast á postkortini, men av tí, at nógv børn eru smá, er teksturin bæði stuttur og greiður.

Tá ið navnið á móttakaranum er skrivað ovast, kann teksturin stutt og greitt ljóða:

**„Vit vilja sleppa aftur í skúla. Heilsan...“** og so skal navnið og bústaðurin á sendaranum setast niðast.

Og tey trý, sum kortini skulu sendast til, hava hesar adressurnar:

**Karsten Hansen**
**Fíggjarmálastýrið**
**Traðargøta 39**
**160 Argir**

**Høgni Hoydal**
**UMMS**
**Hoyvíksvegur 72**
**100 Tórshavn**

**Elsa Birgitta Petersen**
**Føroya Lærarafelag**
**Pedda viðsteinsgøta 9**
**100 Tórshavn**



# Grindamannafelagið aðalfund

Sum fyrr lýst í bløðunum so hevur "Grindamannafelagið" aðalfund í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 8. apríl klokkan 14.00. Fundurin er almennur — øll eru vælkomin at líða á og seta fram spurningar um tað, sum er á skránni.

–Vónandi vera vit eisini nógv, tí grind og grindadráp er viðkomandi fyri flest allar føroyingar, sigur felagið.

Skráin fyri fundin er henda:

1. Frágreiðing um virki felagsins farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi.
3. Val av einum nevndarlimi.
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál:
   a) Viðlíkahald av hvalvágum
   b) Áheitan frá NAMMCO um at nýta kúluongulin meira
7. Ymiskt

**Býtið**

Á hvørjum ári hevur felagið havt útlendskar og føroyskar gestarøðarar við. Í ár eru gestarøðarnir Sjúrður Hansen, lærari á Argjum og Leivur Hansen, býraðsformaður úr Havn. Evnið hesaferð er grindabýtið. Hetta verður tikið upp her, tí hetta hevur gjøgnum árini verið eitt mál, sum nógv hevur verið tosað um, har felagið hevur verið við sínum kunnandi fundum. Og í ár hevur felagið so havt tað sum eitt beinleiðis punkt á skránni á sínum kunningarferðum. Nógv hevur verið tosað um hetta mál og uppskot um, hvussu hetta kann gerast øðrvísi, tróta ikki

– Ja, vit hava enntá sæð sera áhugaverd roknistykki um, hvat er nóg mikið av grind til eina bygd. Og at stoyta grind burtur, fyri bert at fylla kaggarnar av nýggjum, er púra burturvið.

Nú vil felagið so geva almenninginum høvi til at siga sína meining — meira kann tað ikki gera. Myndugleikarnir líða á, og vónandi fáa teir nógv góð hugskot til víðari umhugsan aftan á fundin.

Eitt er sjálvt býtið og tað at fáa sín part av grindini. Aftan á hetta er eisini eitt stórt arbeiði — at taka grindina upp. Eisini her vilja nógv hjálpa og geva ráð.

–Týdningarmikið er, at flest møgulig eru við í hesum mentunararvi okkara, tí annars er vandi fyri, at hann so líðandi doyr út, og tað má hann ikki. Havið er okkara urtagarður, og hann hava vit øll bæði rætt og skyldu til at røkja — men samvitskufult, sigru felagið í tíðindaskrivi.




www.vision.fo

Vision Software spennir seg út

Vit sóknast eftir trimum nýggjum starvsfólkum í Tórshavn at byrja skjótast til ber

Fyrisitingarstjóri

Til høvuðsdeild okkara í Tórshavn skal setast ein fyrisitingarstjóri, ið skal virka í einari trýdeildari leiðslueind, sum er samansett av:

*Fyrisitingarstjóra*
*Sølustjóra*
*Tekniskum stjóra*

Uppgáva fyrisitingarstjórans er fyrst og fremst:
- At byggja upp og menna allar fyrisitingarligar partar av Vision Software.
- At hava ábyrgd av, og skipa fyri, allari fíggjar- og tilfeingisstýring felagsins.
- Saman við leiðslueindini at skapa karmar um eitt sunt handilsligt felag í stórum vøkstri.
- At skapa karmar um ein mennandi starvsfólka- og leiðslupolitikk.
Vit seta sum krav, at rætti viðkomandi hevur holla handilsliga útbúgving og/ ella drúgvar royndir innan sama starvsøki.
Góð løn verður latin eftir góðum avriki.

Bókhaldari/skrivari

Til høvuðsdeild okkara í Tórshavn verður søkt eftir bókhaldara/skrivara at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið er skipað við ábyrgd fyri fyrisitingarstjóranum og eru høvuðsuppgávurnar hesar:
- At røkja alt dagligt bókingararbeiði
- At skipa fyri debitor- & kreditorrøkt felagsins
- At gera ætlanir saman við leiðslueindini og skipa fyri allari uppfylging av hesi, undir hesum rapportering yvir fyri stjórn og nevnd felagsins. Harafturat skal viðkomandi virka sum skrivari hjá leiðslueindini og hava ábyrgd av øllum skrivligum samskifti við viðskiftafólk felagsins. Vit seta sum krav, at viðkomandi hevur holla handilsliga útbúgving og/ella hollar royndir innan bókhalds- og roknskaparabeiði.
Góð løn verður latin.

Sølu- og samskipingarfólk til Wise-Fish deild okkara

Til deild okkara í Tórshavn skal setast eitt sølu- og samskipingarfólk, við ábyrgd yvir fyri sølustjóranum, at taka sær av sølu, menning og levering av Wise-forritsúrdráttum til fiskivinnuna. Wise er felagsheitið á eini røð av skipanum, mentar í Navision Financials umhvørvi, til fiskivinnuna. Talan er um framleiðslustýringsskipanir, søluskipanir, góðskustýringsskipanir v.m., mentar av TM-Software í Íslandi, ið eigur 50% av Vision Software. Starvið er sera spennandi og hevur við sær møguleikar fyri hollari persónligari menning og starvsmøguleikar í útlandinum, herundir Norðanlondum, Stóra Bretlandi og Norður Ameriku.

Um VisionSoftware P/f

Vision Software er eitt forritsfelag í menning. Felagið umboðar, selir og mennir Navision og Navision Financials úrdráttir, og er fyrsta Navision Solution Center í Føroyum. Í løtuni eru 10 starvsfólk knýtt at Vision Software, ið hevur deildir í Tórshavn og Klaksvík. Eigarar av Vison Software P/f eru persónligir stigtakarar, Farodane P/f í Tórshavn og TM-Software í Íslandi. Felagið fæst eisini við frálæru innan Navison og Navision Financials í samvinnu við skeiðdepilin KVASIR í Tórshavn.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum verða at senda til okkara innan 1/5 2000.

**Vision Software P/f**
Stengavegur 3
FO-700 Klaksvík
*Att.: Jógvan Eliasen, stjóri*

Ynskja tygum at frætta meiri um størvini, eru tygum vælkomin at ringja til omanfyristandandi.

FD-04-000-5

NAVISION® solution center

VISIONSOFTWARE

Brekkutún 4
110 Tórshavn
Tlf. 32 14 40

Stengavegur 3
700 Klaksvík
Tlf. 45 79 40